ComData í Klaksvík:

# Seta húsini upp av nýggjum

**Flestu klaksvíkingar munnu minnast kvøldið fyri góðum tveimum árum síðani, tá teldufyritøkan ComData nærum brendi í grund. Síðan eldin hevur fyritøkan húsast í tí partinum av húsinum, sum ikki brendi, men nú verður farið undir at byggja alt upp av nýggjum**

ELDUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Í farnu vikuni fóru menn á ComData undir at ríva allan tann gamla bygningin niður. Byrjað var tíðliga um morgunin, og um náttúrðatíð lógu allir veggir knústir á gólvinum.

Ætlanin er, at hesin gamli bygningur skal setast upp av nýggjum, soleiðis at fyritøkan aftur tað pláss, ið hon hevur fyri neyðini.

Síðan eldin hava fólk á fyritøkuni húsast í heimara bygninginum, sum liggur við síðuna av tí gamla bygninginum. Hesin bygningur var eisini áðrenn eldin ein partur av ComData.

Hetta hevur tarnað virkseminum hjá fyritøkuni eitt sindur, tá minni pláss hevur verið til øll starvsfólkini.

– Í løtuni sita 3 mans saman, har tann eini sat fyrr, so sjálvsagt er minni av plássi til hvønn, sigur Olivur Thomsen, stjóri á ComData.

Hann leggur tó afturat, at starvsfólkið sum oftast hava fleiri uppgávur at gera uttanfyri húsini, og hava tí ikki merkt stórvegis til nakrar trupulleikar av ov lítlum plássi

Ætlanin er at seta upp ein nýggjan byggning, har tann gamli stóð, og kemur hesin nýggi bygningur at minna um tann heimara partin av fyritøkuni.

### Byggja í heyst

Olivur Thomsen, stjóri í ComData, greiðir frá, at í løtuni eru menn farnir í holt við fyrireikingarnar til tann nýggja bygningin, sum skal setast upp.

– Tá alt so er gjørt byggibúgvið, fara vit at heinta tilboð inn um at gera sjálvi húsini. Væntandi verður so farið undir at sjálva byggingina einaferð í heyst, sigur Olivur í stuttari viðtalu við Sosialin.

Nýggi bygningurin kemur at standa á sama staðið, har tann nú niðurbrendi bygningurin stóð. Hann verður tó eina hædd lægri enn tann gamli, men harafturímóti kemur hann at verða størri til víddar.

Ætlanin er, at ein sølubúð skal verða í ovastu hæddini, meðan forritarnir koma at húsast í tí niðari hæddini. Harafturat skal ein hædd leigast út til annað virksemi.



*Nýggi bygnurin kemur at standa á sama staðið, har tann nú niðurbrendi bygningurin stóð. Í farnu vikuni fóru menn undir at ríva allan tann gamla bygningin niður*

# Kioskin umborð á Dúgvuni skift leigara

**Leygardagin tann 1. juni skifti kioskin umborð á Dúgvuni leigara. Tað er smápartafelagið á Høvdanum, sum nú skal standa fyri at fylla kioskina við alskyns vørum til tey ferðandi**

DÚGVAN
*Ragnhild Ellingsgaard*

Smápartafelagið á Høvdanum hevur í eina tíð rikið kioskina við fótbóltsvøllin, og ætla tey reka kioskina umborð á Dúgvuni á sama hátt, sum tann fyrra kioskin verður rikin.

### Broytingar á veg

Símun á Høvdanum, nevndarlimur í smápartafelagnum á Høvdanum, greiðir frá, at enn er so stutt tíð fráliðin, síðan felagið yvirtók kioskina, og tí eru ongar stórvegis broytingar komnar longu nú.

– Men innan stutta tíð skuldi ein helst sæð, at tað nú eru vit, sum reka kioskina, sigur hann.

Her sipar hann til, at onkrar smávegis broytingar longu eru í umbúna, og kunnu tey ferðandi gleða seg til eitt størri úrvæl umborð.

Í eina tíð hava eingi bløð verið at fingið umborð á Dúgvuni, og úrvælið í kioskini hevur verið so sum so. Men sum Sosialurin skilur á Símuni, so verður alt hetta broytt.

– Fyrimunurin við at reka eina kiosk umborð á Dúgvuni er, at har ferðast millum 50 og 100 fólk við hvørjum túri. Um tú hevur okkurt at bjóða øllum hesum fólkum, so fært tú tey eisini at keypa frá tær, heldur hann.

Harafturat hevur felagið ætlanir um at breiðka úrvælið umborð, soleiðis at kioskin eisini kemur at selja breyð og annað gott. Eins og Smyril ger.

– Tað mest umráðani er at hava okkurt til øll, og at veita eina góða tænastu, sigur Símun í stuttari viðtalu við Sosialin.



*Innan stutta tíð skuldi ein helst sæð, at tað eru vit, sum reka kioskina, sigur Símun á Høvdanum*

# Hárviðgerð og húðrøkt á sama staði

**Mánadagin í farnu viku lat 25 ára gamla Tina Rasmussen upp eina vakurleikaklinikk í hølinum, har Salong Afrodite heldur til, so nú letur tað seg gera at fáa bæði hár og húðrøkt á sama staði í Klaksvík. Sosialurin hevur verið til eitt lítið prát, nú góð vika er farin, síðani hon lat upp**

VAKURLEIKI
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Tá Sosialurin kemur á gátt hendan kalda og gráa morgunin, verði eg víst inn í eitt ljóst og hugnaligt høli. Mitt á gólvinum stendur ein stólur og eitt tað fyrsta, ein hugsar um, er tann fríski lukturin, sum er inni. Hølið er ikki stórt, men tað er sera hugnaligt og ein kennir seg beinanvegin væl til passar. Á eini hyll standa nógv ymisk produktir av merkinum Living Dimension. Hetta er eitt merki, sum kemur úr Eysturríki.

Tina Rasmussen er í læru sum medesinskur kosmetologur. Hetta er ein útbúgving, sum hon tekur um internetið og gjøgnum brævskeið. Tina greiðir frá, at útbúgvingin tekur umleið trý ár, og at hon eisini fer niður onkur vikuskifti á skeið, sum liður í útbúgvingini.

– Tá hittast vit, sum byrjaðu í senn, sigur Tina.

– Vit eru seks, sum byrjaðu. Tað er bara eg úr Føroyum, greiðir hon frá. Hetta at kunna taka hesa útbúgvingina um internetið er ein nýggjur møguleiki, so tey fimm og Tina eru tey fyrstu, sum eru farin í holt við hetta.

Tina heldur, at hon hevði hug at undirmeta hesa útbúgvingina.

– Eg veit ikki, men eg hugsaði bara kosmetolog, tú veitst, akkurát sum um tað ikki er so ræðuliga nógv, men har fór eg sanniliga skeiv. Tað er sera strævið at arbeiða og lesa samstundis, sum ein skal taka sær av familjulívinum, heldur hon. Og leggur dent á at í øllum førum hetta slagið av kosmetologi, sum hon nú er farin at útbúgva seg til, er strævið.

– Tað er nógv evnafrøði at lesa, og ikki tær at siga, so er tað ræðuliga turrur lesnaður til tíðir, sigur Tina og flennir so hjartaliga.

Tina kann bjóða kundum sínum fleiri ymiskar viðgerðir. Andlitsviðgerð, voksviðgerð, aknuviðgerð, rygg- og bringuviðgerð og eisini er ein viðgerð til menn. Tina bjóðar eisini eina tannáringaviðgerð, sum er tillaga ungu húðini. Hetta tryggjar, at húðin verður verandi elastisk.



*Heilt fitt av kundum hava verið inni í teim hugnaligu hølunum hjá Tinu og fingið onkra av teim mongu viðgerðunum, sum hon bjóðar*

### Hár og húðrøkt

Tað var Joan Baldvinsson, eigari av Salong Afrodite, sum av fyrstan tíð fekk hugskotið.

– Eg hugsaði um at fáa okkurt annað aftur at inn í salongina, tí eg helt, at tað kundi vera gott at kunna bjóða aðrar tænastur til kundan eisini, greiðir Joan frá.

– Eg hugsaði fyrst um at fáa mær solarium, men tað hevði bundið meg til at havt salongina opna aftan á tær vanligu opningstíðirnar, so tað droppaði eg, sigur Joan, sum leggur afturat, at hon har afturat ikki heldur, at lukturin frá einum solarium hóskar seg væl inni í eini frisørsalong.

So var tað, at hon kom at hugsa um húðrøkt. Hon kennir Tinu væl, og visti, at hon er í læru til medesinskan kosmetolog.

– So eg setti meg í samband við Tinu og hon var við upp á hetta her. Og so fór alt í gongd, og nú sita vit her, sigur Joan.

– Tað er púra vanligt, at ein arbeiðir, meðan ein er undir útbúgvingini. Øll hini, sum eg byrjaði saman við arbeiða eisini, so eg eri glað fyri at hava fingið henda møguleikan, skoytir Tina uppí.

Klinikkin hjá Tinu verður opin um dagarnar, meðan Salong Afrodite er opin. Hon hevur egið telefon nummar, men eisini letur tað seg gera at bíleggja sær tíð hjá Afrodite.



# Gongur væl hjá høvuðsvinnuni, gongur eisini væl hjá landinum

**– Mong fáa ágóðan av tí virksemi, sum vinnan fremur, sigur formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Jákup Sólstein.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Á aðalfundi Føroya Reiðarafelagsins herfyri vísti Jákup Sólstein í síni formansfrágreiðing á, at limir felagsins høvdu eitt gott ár í fjør. Hetta merktist eisini aftur í samfelagnum annars.

– Gongur væl hjá høvuðsvinnuni, gongur eisini væl hjá landinum.

Hann segði, at avreiðingarvirði fór yvir tær tvær miljardirnar, og at bara limirnir í

Reiðarafelagnum høvdu hýruútreiðslur uppá 740 milj. krónur.

– Taka vit umsitingarlønir og avlop við, man okkara beinleiðis ískoyti bara í skatti liggja væl yvir 300 milj. krónur. Hetta svarar til 66 oyru fyri kg., sum reiðarar og fiskimenn lata almennu kassunum, segði Jákup.

### Fellir á mong

Hann vísti á, at torørt er at siga, hvat beinleiðis avreidda virði av hesum virksemi er, men helt, at talan man vera um hundraðtals miljónir, ið árliga verða vunnar av bankum, tryggingarfeløgum, oljufeløgum, skipasmiðjum, reiðskapsframleiðarum, heilsølum, flutningsfeløgum og aðrari tænastuvinnu.

– Tað eru heldur ikki so fá almenn arbeiðspláss, ið eru ein beinleiðis avleiðing av tí virksemi, sum vinnan fremur.

Jákup helt, at hetta eigur at geva teimum okkurt at hugsa um, sum í tíð og ótíð eru úti um seg við ymiskum pástandum um fiskivinnuna.

– Tí, tað eru tey, sum halda, at fiskivinnan einans er eitt fyribrigdi, sum á meira ella minni ólógligan hátt hevur tiltuskað sær rættin til »ogn Føroya fólks« uttan at gjalda nakað fyri tað, segði formaðurin í reiðarafelagnum.



*– Fiskivinnan er ikki eitt fyribrigdi, sum á meira ella minni ólógligan hátt tiltuskar sær rættin til »ogn Føroya fólks« uttan at gjalda nakað fyri hetta, sigur Jákup Sólstein*

# Vandi er fyri, at fleiri rækjuskip noyðast at gevast

**– Í ringasta føri kann samfelagið missa einar 300 milj. krónur, um rækjuflotin verður mistur, sigur formaðurin í reiðarafelagnum.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Heimaflotin, nótaflotin og verksmiðjuflotin høvdu eitt gott ár í fjør, men hjá rækjuflotanum stendur illa til, hóast rækjunøgdirnar vóru størri enn nakrantíð*

Á aðalfundi reiðarafelagsins vísti Jákup Sólstein á, at botnfiskaveiðan undir Føroyum hevur verið rættiliga støðug seinastu 20 árini burtursæð frá tíðarskeiðinum, 1991-1994.

– Miðalveiðan liggur um 100.000 tons, og tað er tað, sum fiskað verður undir núverandi dagaskipan, segði hann.

Jákup segði, at ofta verða samanburðir gjørdir við gomul hagtøl – alt eftir, hvat hesir samanburðir skulu nýtast til, men ansast má eftir, at allar fyritreytir verða tiknar við.

– Tað er ein sannroynd, at tey øki, sum í dag eru opin fyri veiði, eru sera nógv skerd í mun til áður. Veruleikin er eisini, at í dag eru tað færri skip, sum fiska árligu nøgdirnar.

Hann helt, at vit samanumtikið kunnu siga, at trýstið á fiskastovnarnar í dag er nógv minni, enn tað var í teimum tíðarskeiðum , vit plaga at samanbera við.

Um heimaflotan, segði Jákup Sólstein, at hann hevði eitt gott ár í fjør.

### Nótaskipini og verksmiðjutrolarar gott ár

Bæði í nøgd og virði var seinasta ár hjá nótaskipunum sera gott, og hetta kemst serliga av, at prísurin á sildini var so góður.

– At bæði nøgd og prísur á makreli vóru so optimal, sum ongantíð áður, gjørdi støðuna uppaftur betri. Aftrat hesum kundu skipini fiska óavmarkaðar nøgdir av svartkjafti í 2001, og fiskiskapurin var sera góður.

Jákup segði seg ikki vænta, at svartkjaftanøgdirnar í ár verða í nánd av tí, tær hava verið.

Formaðurin í reiðarafelagnum segði, at verksmiðjutrolararnir høvdu eisini eitt gott ár í fjør.

– Nøgdirnar vuksu, og kemst hetta av fiskiskapinum í Irmingarhavinum. Veiðivirði í 2001 var tó tað sama sum í 2000.

Hann segði, at úrslitið hjá verksmiðjutrolarunum er tengt at teimum sáttmálum, vit fáa við Russland og Noreg eins og útlitunum fyri fiskastovnunum í Barentshavinum.

– Noregssáttmálin er somuleiðis nær tengdur at teimum møguleikum, sum norsk línuskip fáa á djúpum vatni undir Føroyum, og russarasáttmálin er tengdur at svartkjafti og makreli í føroyskum sjógvi.

Jákup segði, at hetta kann koma at geva okkum trupulleikar í framtíðini.

### Rækjuskipini sera illa fyri

Meðan formaðurin í reiðarafelagnum kundi fegnast um gongdina hjá heimaflotanum, nótaskipunum og verksmiðjutrolarunum, harmaðist hann um støðuna hjá rækjuflotanum.

– Rækjuflotin er sera illa fyri. Hetta kemst av teimum sera lágu rækjuprísunum og teimum til tíðir høgu oljuprísunum, samstundis sum rækjufiskiskapur er ein sera orkukrevjandi vinna.

Hann segði, at fleiri uppskot hava verið frammi um, hvussu trupulleikarnir hjá rækjuskipunum kunnu loysast.

– Bæði felagið Rækjuskip og Føroya Reiðarafelag hava vent sær til myndugleikarnar, men tað er einki, sum bendir á, at nøkur stig verða umhugsað og enn minni tikin fyri at finna leiðir burtur úr kreppuni.

Jákup vísti á, at hóast veiðimøguleikarnir hjá rækjuflotanum eru rímiliga góðir, er tað ikki møguligt hjá flotanum í verandi støðu at framleiða seg burtur úr kreppuni, sjálvt um nøgdirnar í 2001 munnu vera tær størstu nakrantíð, nevniliga góð 19.000 tons.

– Eg beri tí ótta fyri, at fleiri rækjuskip verða noydd at gevast, um ikki vend kemur í.

Jákup Sólstein segði, at í ringasta føri kann samfelagið missa einar 300 milj. krónur, um rækjuflotin verður mistur.

HYGG HER

Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

Citroen Jumpy 1,9TD 8 ferðandi
km. 28.200, árg. mars 2000
190.000,-

Citroen Xsara 1,6i 5h
km. 30.000, árg. feb. 1998
107.000,-

Citroen Xsara 2,0 HDi Stc. 5H
km. 83.000, árg. juni 1999
140.000,-

Citroen Xsara 2,0 HDi 5H
km. 90.000, árg. nov. 1999
152.000,-

Citroen Jumper CH. v/last
km. 120.000, árg. aug. 1998
130.000,-

Citroen Xantia 1,9TD 5h
km. 60.000, árg. feb. 1998
118.000,-

Citroen Xantia 1,8i 16V 5h
km. 63.000, árg. okt. 1996
112.000,-

Mitsubishi L300 2,5D
km. 161.000, árg. juni 1994
70.000,-

Ford Sierra 2,0i CLX 4h
km. 110.000, árg. nov. 1991
45.000,-

Peugeot 306 1,9D 4H
km. 161.000, árg. mai 1995
84.000,-

Seat Cordoba 1,9SDi STC. 5h
km. 35.500, árg. aug. 1999
115.000,-

Mazda 323 1,5 4h
km. 130.000, árg. apr. 1997
75.000,-

Ford Escort 1,6i STC. VAN
km. 95.500, árg. mars 1997
53.000,-

Toyota Camry 2,0 GLi 4h
km. 138.000, árg. aug. 1987
24.000,-

Mazda Demio 1,3 5h
km. 50.000, árg. feb. 1999
99.000,-

Møguleiki er eisini at royna nýggjar bilar

Vælkomin til
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Sosialurin - 311820